# Havnanevndin óvitandi um ætlan



350 íbúðir, 2.200 skrivstovupláss, Hotel við 250 kømurum, 10.000 fermetrar konsert- og ráðstevnuhøli, 2100

**Tórshavnar býráð hevur enn ikki tikið nakra støðu til verkætlanina hjá P/F Havnar Bryggju. Partafelagið greiddi bæði býráðnum og Havnanevndini frá verkætlanini longu í 2007, men Leivur Hansen, formaður í Havnanevndini, sigur seg ikki vita nóg mikið til at hava nakra áskoðan**

BYGGIVERKÆTLAN
*Bjørk K. Olsen*
*bjork@sosialurin.fo*

Havnanevndin fekk gjáramorgunin eina fullgjørda ætlan av verkætlanini hjá P.F. Havnar Bryggja og fer at viðgera umsóknina í heyst. Leivur Hansen, formaður í nevndini sigur frá, at hann er fegin um at fáa hugskot, ið kunnu gera høvuðstaðin betri, hugnaligar og dynamiskari, og at tey eru hjartaliga vælkomin. P.F. Havnar Bryggja hevur lagt uppskotið fram fyri býráðnum og Havnanevndini áður, sigur Leivur Hansen.

*Hevur tú nakra ítøkiliga støðu til málið?*

- Tað velst um, hvussu tað fer at síggja út fíggjarliga, sigur Leivur Hansen, sum havnanevndarformaður noyðist eg at vita, hvussu verkætlanin kemur at ávirka havnina. Vit hava fremstu havnina í landinum, og eg kann ikki ímynda mær annað, enn at býráðið og nevndin framvegis ætla at vera á odda við havnarrakstrinum.

Jógvan Hugo Hansen, í P/F Havnar Bryggja, skilur ikki hesa útsøgnina og greiðir frá, at partafelagið áður hevur sitið saman við nevndini og greitt teimum frá verkætlanina. Jógvan Hugo Hansen sigur, at Havnanevndin veit, at fíggjarliga er alt avgreitt, og at tey næstu seks til tíggju árini fer verkætlanin ikki at ávirka plássið hjá skipunum, ið leggja at kaiini í Havn.

Byggiætlanin er býtt upp í eini 10 til 15 byggistig. Bara tey fyrstu tvey byggistigini fara at taka eini seks til tíggju ár, og eftir hesum verður ikki sami tøvurin. Kaiin í Havnini er longu so grunn, at stór skip ikki fáa lagt at, so sami tørvur á kaiini í Tórshavn verður ikki um 20 ár, greiðir Jógvan Hugo Hansen frá.

- Vit vilja samstarva við Tórshavnar Býráð, og alt býráðið fekk verkætlanina frágreidda longu mars 2007, og somuleiðis havnanevndin stutt eftir.

Leivur Hansen óttast, at verkætlanin kemur at forða skipaflutningin inn í havnina í høvuðstaðnum, men Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavnar Býráð, sigur soleiðis í eina viðmerking við Portalin:

- Kommunan byggir út í Kollafirði, og at tí verður møguliga pláss fyri øðrum verksemi í Tórshavnar Havn. Hetta merkir so, at bingjuhavnin ikki longur fer at vera í Havn, men skal flytast til Kollafjarðar.

- Verkætlanin burdi ikki verið nøkur forðing, og næstu árini fer hon ikki at ávirka innflutnigin í Tórshavnar havn, sigur Jógvan Hugo Hansen..

- Hetta sær annars ógvuliga spennandi út, men enn hevur eingin politisk viðgerð verið av hesum málinum, og tí fái eg ikki úttala meg vegna býráðið, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavnar kommunu.



*Um verkætlanin verður góðkend av Tórshavnar býráð, fer bryggjan at húsa upp til 7.500 fólkum í senn*